# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Naena Danielsen 80 ár



*Naena Danielsen við einum av sínum handritum*

Í dag 5. mars verður Naena Danielsen í Havn 80 ár. Naena er ættað úr Sýðrugøtu, dóttir Poul Amaliel Mikkelsen, og Perlinu, f. Højgaard. Tey vóru 7 systkin. Brøðurnir vóru Niclas, Palli og Petur Eli og systrarnar vóru umframt Naenu, Petra, Mona og Antona. Bert systrarnar eru á lívi.

Tey vóru av góðum bergi brotin. Í faðirættini eru tey úr Barbustovu. Abbin, Petur Pauli, var tiltikin fyri sína styrki. Mamman var dóttir fyrstu niðursetufólkini í Rituvík Nicolinu og Per, sum eiga sína serligu søgu.

Naena kom blaðung til Havnar í 1943 at passa systir sína Monu upp. Mona hevði í sjómansheiminum hitt norðmannin Thoralf Gjerstad. Tey giftast í 1942, og tey komu at gerast partur av søguni um norðmenn í Føroyum undir krígnum.

Í Havn hitti Naena Sigurd Danielsen, sum var ættaður av Hvítanesi. Hann hevði verið niðri undir krígnum og lært til bakara. Hann slapp sum hinir føroyingarnir í Danmark ikki heim fyrr enn eftir krígslok. Tey giftust í 1948.

Sigurd fekk astma og fekk ikki arbeitt sum bakari. Hann fór tí at handla í 1955, og tey høvdu handil til 1988, tá aldurin var kom at gevast, og kom handilin at gerast arbeiðið hjá Naenu alla hesa tíð. Sigurd var eisini ein undangongumaður í rækjuvinnuni og var við til at byggja fyrsta "Hvítanes". Seinnu árini sigldi hann eisini nógv við ymiskum fiski- og farmaskipum. Sigurd andaðist í 2002. Naena kom eisini í seinnu árum at vera virkin í Heimavirkinum saman við bygdarkonuni Óluvu Húsgarð.

Tann sum skrivar hesar reglur havi altíð kent Naenu sum eitt av teimum mongu gøtufólkunum í Havn.

Men seinnu árini eru eg komin at kenna hana sum eitt fróðarfólk, sum er ótrúliga vitandi um mong viðurskifti. Eina mest veit hon um bygdar- og ættarsøgu, og tað er eisini so heppið, at hon dugur at skriva sína vitan niður.

Hon hevur tískil skrivað niður sína ættarsøgu, sum samstundis er ein munandi partur av søguni hjá Sýðrugøtu. Hesa søguskriving fekk FF-blaðið stóra gleði av, ta tíð tað var, og hevði blaðið nógvar av hennara frásøgnum.

Sum sagt var abbin í Gøtu úr Barbustovu, meðan omman var av Dunganum, sum eisini átti síni merkisfólk.

Frásagnirnar hjá Naenu finnast á heimasíðuni: www.fiskimannafelag.fo.

Dungasøgan finst í bløðunum 310 og 311. Barbistovusøgan finst í blað nr. 325. Søgan um Thoralf og Monu er í nr. 317. Naena hevur eisini greitt frá søguni hjá Sigurd og Hvítanes, og hon finst í blað nr. 283. Tey, sum hava áhuga, kunnu tískil finna fram til hesar frásagnir, sum vóru sera væl umtóktar, tá tær komu fram.

Naena hevur eisini skrivað um torvskurð hjá Sýðrugøtufólki og um fiskaturking í Sýðrugøtu, eins og hon hevur givið sítt íkast til annað siðsøguligt tilfar.

Tað merkist ikki á Naenu, at hon er áttati. Hon er framvegis virkin í einum vaskiholdi í Ebenezer, har hon eisini á annan hátt hevur verið trúgv øll síni ár í Havn.

Naena er eisini sera ættarkær og ætt út í fleiri lið roknar hon sum síni næstrafólk, sum hon eisini hevur umsorgan fyri. Trúføst er hon sum trøllið, og er hetta ein eginleiki, sum sigur meira enn mangt annað.

Naena eigur børnini Poul, Per og Ingibjørg. Ommubørnini eru 10, og langommunbørnini fýra.

Góða Naena! Hjartaliga tillukku við teimum 80 árunum og takk fyri vinskap og trúfesti.

Naena er ikki heima føðingardagin.

**ó.**

# Goodvin Mellemgaard 70 ár



Í dag 5. mars fyllir Goodvin Mellemgaard í Hirtshals 70 ár.

Goodvin er ættaður úr Klaksvík. Foreldrini vóru Petra og Hans Mellemgaard.

Goodvin fór í læru sum timbursnikkari í Hirtshals í 1956, og hevur hann búð har síðani og hevur sína familju.

Vegna vánaliga heilsu býr hann nú á røktarheiminum Lynggaarden, Østergade 30, C st. – 4, DK-9850 Hirtshals.

Lesið Sosialin - so eru tit við

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sofus Richard Klakkstein, úr Innistovu í Klaksvík**, andaðist sunnudagin 4. mars á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 49 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Linda Justinussen, Gøtu**, andaðist á Landssjúkrahusinum 4. mars, 67 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Vagn Mortensen** fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju týsdagin kl. 13. Sungið verður Sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Vagn, kunnu lata Tvøroyrar kirkju eina peningagávu.

**Lisa Nattestad, fødd Rasmussen úr Miðvági**, andaðist á Landssjúkrahúsinum 4. mars 88 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinri.

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum luttóku í stóru sorg okkara, tá elskaði maður mín, pápi, sonur, verfaðir, bróðir, versonur og svágur

**Sigurd Bærentsen**

varð tikin frá okkum, takka vit hjartaliga.
Eina serliga tøkk veita vit Elisi, Finni Olsen, Nannu og Zachariasi. Eisini mugu vit nevna ta stórfingnu hjálp og stuðul, sum varð veittur okkum av skopuningum og øðrum við, sum vístu okkum stóra umsorgan og kærleika alla tíðina, meðan Sigurd var sjúkur.
Tøkk til heilsusystrar og heimahjálparar.
Tøkk til prest fyri troystarrík orð.
Tøkk til manskór og Sámal Hanna fyri frálíkan sang og til Tummas fyri vakurt spæl.
Tøkk fyri blómur, kransar, peningagávur til kirkjuna og okkum.
Tøkk til øll tey mongu, sum vóru í kapellinum, á keiini, harímillum teir fittu skúlanæmingarnar, og tey, sum fylgdu Sigurdi til hansara síðsta hvíldarstað.
Tøkk til tey, sum hjálptu til við ervinum og sum bakaðu so nógv gott.
Tøkk fyri bøkur minningarorð.

*Familjunnar vegna*
**Sólva,**
**Jónsvein, Kristin og Beinta, Jákup Ebbi, Pætur, mamma og pápi**

*Tann, sum lívgar onnur, skal sjálvur verða lívgaður*

**Dagurin**

**6. mars. Gotfred.** Óvist er, hvønn sipað verður til. Summir halda ein kardinal í Róm, deyður umleið ár 1100, aðrir ein biskup í Amiens, deyður í 1115. Týskt navn settsaman av orðunum Guð og friður.